

*Hans Jørgen Djurhuus, sum her sæst í dysti við Hanus Eliasen, royndist væl á vinstra bakki hjá GÍ, og hann var eisini maðurin, sum legði upp til útjavnandi málið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-GÍ 1-3 (0-0):

# Alt avgjørt móti endanum

**Fuglfirðingar hildu seg hava sigurin í hond, tá teir skoraðu móti dystarenda, men við trimum málum seinastu løtuna koppaðu gøtumenn øllum á høvdinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er aftur gerandisdagur í Fuglafirði. Í øllum førum, tá tosað verður um granna-uppgerðir, har GÍ mest sum altíð hevur verið drúgvari enn fuglfirðingarnir.

Í vár var støðan tó nakað øðrvísi, tá ÍF fyrstu ferð í nógv ár vann á GÍ, og tað var eisini heilt leingi, at vónin um eina endurtøku livdi sunnudagin.

### Gott málmansspæl

Fyrri hálvleikur var sera lívligur, og at eingi mál komu hesa løtuna var einamest góðum málmansspæli frá Poul Næs Joensen í GÍ-málinum at takka. Hann er læntur frá HB fyri restina av kappingarárinum, og heldur hann støðinum, sum hann sýndi hesaferð, so er lítið at ivast í, at hann kann gerast góður fongur hjá GÍ.

Tað nervaði tó fuglfirðingarnar, at teir vórðu noyddir at fremja broytingar hampuliga tíðliga í dystinum. Eftir hálva tímanum fór Poul Ennigarð av vøllinum við skaða, og sama søgan endurtók seg, tá Sylla beint fyri steðgin mátta geva skarvin yvir.

Tað gav GÍ betri rásarúm eftir steðgin, og teir royndu eisini at leggja trýst á fuglfirðingarnar. Teir spældu seg eisini til møguleikar, men eins og Poul var tað fyri steðgin, so var tað nú Jacob Kaas í ÍF-málinum, sum sýndi gott spæl.

Soleiðis gjørdist talan um hampuliga tunga gongd hjá GÍ, og tá ÍF so eisini kom á odda, mundu fleiri av viðhaldsfólkunum hjá GÍ halda, at hetta bara skuldi vera ein av døgunum, har einki vildi bera til.

### Koppaðu øllum

Men tað hildu spælararnir ikki. Teir løgdu enn meira fyri, og tá ÍF samstundis ótilvitað varð trýst longur aftur, kom serstaka treiskni hjá GÍ enn einaferð til sjóndar.

Hans Jørgen Djurhuus var upphavsmaður til útjavnandi málið, tá hann slapp oman at baklinjuni, áðrenn hann fann ein púra leysan Sámal Joensen. Og l ítla løtu seinni fann eitt nýtt innlegg úr vinstru høvdið á Krzysztof Popczynski, og so stóð 1-2.

Fuglfirðingar royndu nú at spenna bogan høgt seinastu løtuna. Men ein minutt fyri dystarlok kundi Krzysztof avgera dystin fullkomuliga. Hesaferð var talan um sera góða skotroynd, sum fullkomuliga tók ÍF-málverjan á bóli, og so kundu gøtumenn av álvara fegnast. Ikki bara megnaðu teir fyri aðru ferð í ár at vinna á ÍF. Meira týdningarmikið var helst, at teir við teimum trimum stigunum av álvara togaðu seg úr botninum, sum fyri tað nógva hevur verið óhugnaliga nær hetta kappingarárið.

Hjá ÍF stendur hinvegin verri til. Enn hava teir trý stig niður til KÍ, sum framvegis er beint undir strikuni, men soleiðis sum úrtøkan hjá fuglfirðingunum hevur verið teir nógvu seinastu dystirnar, so skal vend koma í, áðrenn alt ov leingi. Komandi umfarið skulu teir vitja á Skála, og tann dysturin verður so ikki av lættara slagnum. Hinvegin, so hava fuglfirðingarnir ikki tapt fyri Skála í ár, og tað er kanska ein sannroynd, sum teir kunnu nýta positivt.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-GÍ 1-3 (0-0)**
0-1: Hanus Eliasen, 72.
1-1: Sámal Joensen, 76.
1-2: Krzysztof Popczynski, 82.
1-3: Krzysztof Popczynski, 89.
**Dómari:** Petur Reinert
**ÍF:** Jacob Kaas - Áki Petersen, Poul Ennigarð (Atli Petersen, 32.), Símun Eliasen, Rúni Elttør - Hanus Eliasen, Høgni Zachariasen, Emil N. Leifsson, Eyðun Ryggshamar -. Sylla D. Ahmed (Dánjal P. Højgaard, 44.), Bartal Eliasen
**GK:** Poul Ennigarð, 19., Atli Petersen, 34., Rúni Elttør, 60.
**GÍ:** Poul N. Joensen - Jónreid Dalheim, Robert Rzeczysky, Kaj Ennigarð, Hans Jørgen Djurhuus - Hans Pauli Petersen (Bjarni Justinussen, 84.), Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Hanus Jacobsen - Poul Arni Jacobsen (Sam Jacobsen, 90.) - Krzysztof Popczynski

# NSÍ stóð

**Hóast B36 hevði bóltin nógv tann størsta partin av tíðini, so var tað NSÍ, sum hevði størstu málmøguleikarnar, tá ið teir tóku enn eitt stig móti toppinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



B36 kendi ikki sína vitjunartíð í dýrdarveðrinum í Runavík. NSÍ fekk mál burturúr einum av fimm møguleikum, og so vunnu teir øll stigini í spennandi og intensu uppgerðini.

Einasta málið fekk NSÍ, tá ið stóri pinnurin var triðju ferð á veg runt. Vongverjin í vinstru, Einar Hansen, tveitti langt innkast, Helgi L. Petersen, sum aftur hesa ferð var annar av framherjunum, snittaði víðari við høvdinum, og Páll M. Joensen var enn eina ferð á rætta staðnum í røttu løtuni, tá ið hann var púra blankur og við høvdinum smekkaði bóltin upp í handara málkrókin.

Heimafagnaðurin var stórur, og fyrsta korterið var NSÍ væl við. Eftir at Allan Mørkøre úr høgru hevði havt góða skotroynd, gjørdist Christian Høgni Jacobsen leysur í høgru, hann slapp langt inn í brotsteigin og smekkaði til úr góðari støðu, men bólturin fór við síðuna av málinum hjá Jákupi Mikkelsen, sum síðani fyri tað mesta ikki hevði stórvegis at gera.

Síðstu fimm korterini vóru teir á heimaliðnum tríggjar ferðir vandamiklir. Jónstein Petersen var tvær ferðir leysur í vinstru, og Helgi L. Petersen fekk mitt fyri mega møguleika. Men tað tóktist sum um, at teir strípputu, eftir at teir høvdu telvað seg í góðar støður, gjørdust linir í kongunum og lítið avgjørdir, tá ið teir stóðu frammanfyri landsliðsmálverjanum, sum vann tvídystirnar.

Fimm teir síðstu minuttirnar var Jákup Mikkelsen rættuliga virkin í brotsteiginum hjá Jens Martini Knudsen. Tað var um reppið, at Jákup stútaði hornasparksinnlegg í málið, men tað eydnaðist ikki, og harvið gjørdist málið, sum leigusveinurin úr HB beinanvegin hevði stútað, tað avgerandi.

Í summarsteðginum ásannaðu teir í NSÍ, at um nakar møguleiki skuldi verða fyri heiðursmerkjum, so var alneyðugt at vinna tríggjar teir fyrstu dystirnar, sum allir vóru á heimavølli. Tað hava teir nú megnað, og harvið eru teir boð upp á ein av trimum oddasessum.

Men leikliga avrikið størsta partin av tíðini móti B36 bendi ikki á toppplasering. Eftir fyrsta korterið var NSÍ fyri tað mesta kroyst aftur í egnan brotsteig. Teir mistu fullkomuliga takið á miðvøllinum, har teir høvdu ilt við at finna út av, hvussu teir skuldu byrgja upp fyri B36, sum hevði tríggjar sentralar miðvallarar, og sum hevði tríggjar heilt frammi.

Viggo Johannesen og Óli Hansen vóru sannir brandar í miðverjuni. Teir dugdu væl at plasera seg, teir vunnu nógv teir flestu dystirnir í luftini, og teir vóru ógvuliga skjótir og avgjørdir í mann móti manni spælinum.